# FINGIÐ KONTÓRIÐ VIÐ **ÚTSÝNINUM**

NÝGGI **STJÓRIN** Á **TRYGGINGARFELAGNUM** HEVUR VERIÐ Á **TRYGGINGINI** EINA TÍÐ **FRAMMANUNDAN**, OG TÍ ER **GERANDISDAGURIN** IKKI BROYTTUR **KOLLVELTANDI**. – MEN **NÚ** HAVI EG FINGIÐ TAÐ GÓÐA **KONTÓRIÐ** VIÐ TÍ GÓÐA **ÚTSÝNINUM**, SIGUR **REGIN HAMMER** FLENNANDI



**INTERVIEW**
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Fyrstu dagarnar hava tó ikki verið stundir til at njóta góða útsýnið, tí tíðin er farin til samráðingar við Finansiel Stabilitet um yvirtøku av Eik. Í løtuni bíðar tryggingarfelagið eftir svarið uppá teirra seinasta útspæl. Nú er stjórin tó ein annar, enn hann var, tá keypstilgongdin byrjaði. Gunnar í Liða er farin, og Regin Hammer hevur tikið við. Men hvør er nýggi stjórin?

### Avbjóðingar í Føroyum

Regin Hammer hevur verið uttanlands og nomið sær útbúgving. Hann hevur nógvar royndir við spennandi størvum av altjóða formati, millum annað sum umboðsmaður hjá DONG, umframt at hann hevur havt ábyrgd av samskipanini av fíggjarstýringini fyri alla oljuleiting í Evropa hjá DONG. Men síðani 2003 hevur hann búð í Føroyum.

Hevur hann ongantíð viljað roynt seg uttanlands?

– Eg haldi, at tað veldst um hvat man hevur valt. Vit hava fingið eina familju, og tá ber ikki so væl til at ferðast runt í heiminum. Sjálvandi kundi tað verið spennandi at arbeitt í London ella New York eina tíð. Men børnini skuldu vaksa upp í Føroyum, og tí fluttu vit heimaftur eftir nøkur ár uttanlands. Tað var ikki eitt ringt val, sigur Regin Hammer.

Hann slær fast, at tað eru nógvir møguleikar í Føroyum. Tað veldst um, hvat tú gert tað til.

– Tú fært kanska ikki júst tær somu, stóru avbjóðingarnar, sum aðrastaðni, men Føroyar hava so nógv annað. Her er meiri av tí, sum fær menniskjað at trívast. Til dømis náttúran og tær tøttu relatiónirnar við onnur. Í so máta eru Føroyar heimsins besta land.

Regin hevur tí hesi ráð til ung lesandi: Farið út í heim, fáið tykkum útbúgvingar og royndir, men komið so aftur. Føroyar hava brúk fyri nógvum nýggjum impulsum uttan úr heimi, um vit skulu standa okkum í altjóða kappingini.

### If it ain't broken...

Regin hevur verið stjóri í egnari fyritøku, umframt at hann hevur verið varastjóri á Tryggingini. Men hvørjar dygdir metir hann vera tær størstu, ein stjóri kann hava?

– Tað týdningarmesta, ein stjóri kann gera, er at lurta eftir sínum starvsfólki. Her eru 125 góð høvd, og tey tilsamans kunnu koma við fleiri góðum hugskotum, enn eg kann einsamallur.

– Ein stjóri kann ikki distansera seg frá starvsfólkunum, tí starvsfólkini eru fyritøkan. Tí er mín hurð altíð opin.

Regin sigur seg vera sama typa sum fráfarni stjórin, og tí fer vanligi føroyingurin helst ikki at síggja nakrar radikalar broytingar.

– Eg eri ikki Gunnar í Liða. Men vit hava sama hugburð til nógv ting og eru báðir varnir av lyndi. Tað mugu vit vera, tí Tryggingarfelagið er ein av hornasteinunum í føroyska búskapinum. Um alt koppar, má Tryggingarfelagið kunna lofta teimum, sum koma illa fyri. Tí skal hetta felagið rekast við størsta varsemi, sigur Regin. – Og sum man sigur: If it ain't broken – don't fix it.

### Ta góðu skrivstovuna

Hóast hann ikki hevur nakrar kollveltandi ætlanir, so sær Regin stórar avbjóðingar.

– Vit koma í samband við næstan hvørt menniskja í landinum. Tey flestu hava jú tryggingar av onkrum slagi ella pensjón. Harumframt hava vit gjørt nógvar íløgur í føroyska vinnulívið. Hetta er tað perfekta starvið fyri ein búskaparfrøðing, sigur hann smílandi.

Hóast hann bert hevur verið stjóri í fáar dagar, so er Tryggingarfelagið ikki ókent fyri honum.

– Eg havi sitið í nevndini og verið varastjóri, so eg havi verið við til at lagt eina kós fyri felagið. Nú skal eg sjálvur taka róðrið og føra okkum eftir løgdu kósini. Tað er avbjóðandi.

Gerandisdagurin er ikki broyttur nógv, men sum Regin skemtandi sigur – Nú havi eg fingið ta góðu skrivstovuna við tí góða útsýninum.

Hann hevur tó ikki notið útsýnið hesar fyrstu dagarnar, tí samráðingarnar um yvirtøku av Eik hava tikið alla hansara tíð.

### Gávur ella lægri gjald?

Eitt, sum gav Tryggingini nógva umtalu í 2010 var, at tey lótu Landssjúkrahúsinum ein MR-skannara. Nógv ilskaðust um hetta og vildu heldur havt lægri tryggingargjald. Hvat heldur Regin um tað?

– Eg haldi, at tá vit liggja sjúk og skulu skannast, so eru vit øll helst fegin um hasa gávuna, svarar hann skjótt.

Hann greiðir frá, at teir settu seg í samband við sjúkrahúsverkið og spurdu, hvat tey høvdu størstan tørv á, men ikki ráð til við verandi fíggjarkarmum.

– Tørvurin var størstur á einum MR-skannara, og tí bleiv tað til tað. Vit vildu markera okkara 70 ára dag við eini gávu, sum kundi koma øllum føroyingum til góðar.

– Skannarin kostaði 10 milliónir. Vit hava umleið 25.000 tryggingartakarar, og um vit heldur skuldu latið teimum pengarnar, høvdu tey bara fingið nakrar fáar hundrað kr aftur í part. Eg veit ikki, um tey høvdu verið so øgiliga nógv glaðari fyri tað.

– Hinvegin hava vit júst innført eina avsláttrarskipan, sum kann spara húsarhaldunum fleiri túsund krónur. So kanska kann sigast, at tryggingartakararnir hava fingið bæði í posa og sekk.

Hann leggur afturat, at ein kanning herfyri vísti, at tryggingargjaldið í Føroyum er 30-40% lægri enn tað er í Danmark, og tí mugu prísirnir sigast at vera sera sámuligir.

Svarið kemur skjótt, tá hann verður spurdur, um ætlanir eru at lata fleiri gávur.

– Hatta var ein markering av, at vit fyltu 70 ár. Nú mugu vit síggja, hvussu tað verður, tá vit fylla 140, sigur hann flennandi.